J.nr.: F.K. 00-04-
Dato:28. september 2006
Okkara ref. SSS/JFL
E-postur: fko@fuglakomm.fo
Heimasíða: www.fuglakomm.fo

# FUNDARFRÁSØGN

## frá býráðsfundi nr. 12/2006

Ár 2006 tann 28. september kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinumi, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 22. september 2006 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**
Sigurð S. Simonsen
Jann Toftegaard
Dánjal Vang
Signar á Brúnni
Elisabeth D. Eldevig Olsen
Eyðun á Lakjuni
Tórfríður Abrahamsen
Jón Nolsøe Olsen
Petur Abrahamsen

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen

Við á fundinum varð eisini Marin Thomsen, fíggjarleiðari, meðan mál nr. 47/2006 varð viðgjørt.

Jann Toftegaard fór av fundinum kl. 18.25, tá ið mál nr. 52/2006 varð viðgjørt.

**Mál nr. 47/2006.**

**Mál viðv. 1. viðgerð av uppskoti til fíggjarætlan fyri kommununa fyri 2007.**

Fíggjarnevndin hevur móttikið uppskot frá fyrisitingini, dagfest 20. september 2006 til fyribils fíggjarætlan fyri kommununa fyri ár 2007.

Vísandi til grein 39, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri við gildiskomu tann 1. januar 2001, so skal fíggjarnevndin fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið. Sambært stk. 2 í somu grein stendur, at kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan 2 ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili, og skal ætlanin verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

Hjálagda uppskot, sum fíggjarnevndin hevur viðgjørt á fundi tann 21. september 2006 og gjørt broytingar til í mun til sjálvt uppskotið frá fyrisitingini, javnvigar við kr. 59.536.554,00, og verður roknað við einum avlopi upp á kr. 25.345,00.

Rakstrarútreiðslurnar netto til kr. 27.690.594,00, rentuútreiðslurnar netto til kr. 1.237.975,00 og avdráttirnir av føstum lánum til kr. 6.308.312,00 og íløgurnar brutto til kr. 9.890.600,00 og netto til kr. 8.790.800,00.

Avseting til bygging av Røktarheimi, sum sambært býráðssamtykt eigur at verða kr. 2.900.000,00 er lækkað niður í kr. 0,00 í 2007, sum er sama upphædd sum í 2006i 2006. Eftir hesi avsetingingum eigur kommunan umleið kr. 8,0 mió. á bók pr. 31. desember 2006 til nevndu bygging. Av tí at spurningurin um 50% studning frá tí almenna, hetta sambært lóg um bygging av ellis- og røktarheimum, so eigur hetta mál at verða tikið upp aftur við landsstýrismannin í Almanna- og heilsumálum skjótast.

Annars hevur kommunan fingið skriv frá landsstýrismanninum, har sagt verður frá, at kommunan onga stuðulsjáttan fær í hesum umfari, so ein Røktarheimsbygging møguliga verður seinkað 4-5 ár í mun til ta ætlan, sum býráðið samtykti 26. november 2002.

Inntøkurnar av A+B skatti verða mettar til kr. 38.552.826,00 við skattaprosenti 21,5%, meðan partafelagsskatturin verður mettur til kr. 5.500.000,00. Avseting til bygging av Røktarheimi av innistandandi verður kr. 0,00. Higartil hevur eitt kommunuskattaprosent verið nýtt til avsetingina til røktarheimsbygging + nýtsla av innistandandi, men verður neyðugt, um avsetingin skal verða tann sama sum í 2005, sum samtykt er gjørd um, so verður neyðugt við lántøku ella við eykanýtslu av innistandandi.

Um so verður, at avseting aftur verður gjørd í 2007 til Røktarheimsbyggingina, so verður neyðugt sambært býráðssamtykt, sum er galdandi at hækka kommunuskattaprosentið við 1,0%, um raksturin og íløgurnar skulu haldast á tí støði, sum skotið verður upp í uppskotinum til 1. viðgerð.

Fíggjarnevndin samtykti á fundi tann 21. september 2006 at leggja fyriliggjandi uppskot til fíggjarætlan fyri kommununa fyri 2007 fyri býráðið til 1. viðgerð. Henda ætlan verður at skilja sum fíggjarligur karmur fyri rakstri, íroknað íløgum av kommununi fyri 2007, og verður málið eftir viðgerð á býráðsfundinum 28. september 2006 sent út til føstu stóru kommunalu nevndinrnar til víðari viðgerðar fyri síðan at leggja ætlanina aftur fyri býráðið til 2. viðgerð á almenna býráðsfundinum, sum sambært lýsingini verður hildin hósdagin tann 26. oktober 2005.

**Avgerð:**

Uppskotið til 1. viðgerð av fíggjarætlan kommununar fyri 2007 varð gjøgnumgingið og viðmerkingar gjørdar. Samtykt varð at beina uppskotið aftur í fíggjarnevndina til viðgerðar fyri at leggja uppskotið til 2. viðgerð fyri býráðsfundin tann 26. oktober 2006. Áðrenn uppskotið verður viðgjørt av fíggjarnevndini, skulu allar føstu nevndir kommununar hava viðgjørt sín part av ætlanini og gjørt sínar tiltagingar/broytingar bæði viðvíkjandi rakstri og íløgum. (9-0).

**Mál nr. 48/2006.**

**Viðvíkjandi Minnisvarðanevndini.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Minnisvarðanevndini, dagfest 28. juni 2006, har nevndin boðar kommununi frá, at nevndin á fundi tann 28. juni 2006 hevur samtykt at boða frá, at nevndin frá 15. juli 2006 at rokna ynskir at fara frá, og vil mæla til, at mentamálanevndin yvirtekur arbeiðið.

Nevndin takkar í skrivinum kommununi fyri tað álit, ið hn lat nevndini upp í hendi hesi árini.

Mentamálanevndin hevur viðgjørt skrivið á fundi tann 05. september 2006, og mælir býráðnum til at ganga áheitanini frá Minnisvarðanevndini á møti, soleiðis at tað arbeiðið, sum Minnisvarðanevndin hevur tikið sær av framyvir verður gjørt av mentamálanevndini.

Talan er eitt um eitt nú hesi arbeiði:

- Halda verandi plátur yvir sjólætin í góðum standi.
- Fáa til vega nýggjar plátur, tá persónar eru sjólætnir.
- Skipa fyri minningarhaldi við minnisvarðan allahalganardagar.

Annars ber kommunan allar útreiðslur av at halda minnisvarðaøkið viðlíka, viðlíkahalda pláturnar og fáa nýggjar til vega, somuleiðis sum kommunan eisini rindar lýsingar í samband við minningarhald, kransar vm.

**Avgerð:**

Samtykt varð at beina málið aftur í mentamálanevndini til viðgerðar, tá ið býráðið varð av teirri sannføring ikki at avtaka nevndina, men at velja 3 nýggjar limir í nevndina. Mentamálanevndin verður at koma við uppskoti um limir til komandi býráðsfund 26. oktober 2006. (9-0).

**Mál nr. 49/2006.**

**Viðvíkjandi uppskoti um sethúsaútstykking.**

Tekniska nevndin hevur móttikið skriv frá Sigurð S. Simonsen, borgarstjóra, har hann heldur, at tíðin er komin til at taka avgerð um, hvar næsta útstykkingin skal verða.

Viðvíkjandi ognartøkumálinum so fellur avgerðin ikki fyrr enn út á árið, og tessvegna verður allur peningurin, ið avsettur er til útstykking í 2006 nýttur til ta útstykkingina. Borgarstjórin heldur, at nakað av peningi kann verða brúktur til at keypa lendi fyri nú beinanvegin, og at byggibúgvingin kann fara fram í 2007.

Uppskot til útstykkingarøkir:

1. Á vestara landinum frá Rossagerði og úteftir.
2. Uppi í Fløtugerði omanfyri hjá Mohrunum.

Onnur økir, sum tekniska nevndin eisini heldur eru áhugað, eru frá verandi útstykking við Bakkageilina, t.v.s. leingjan av Bøvegi og Bjarnavegi norður á Kirkjurygg.

Viðvíkjandi útstykking á vestara landinum er neyðugt at loysa atkomuviðurskiftini og møguliga íbinding í landsvegin.

Tekniska nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 21. september 2006, og mælir nevndin býráðnum til, at økið, sum kommunan eigur sunnan fyri Bakkageilina, verður útstykkjað til sethúsabygging. Her verða pláss fyri 3-4 grundstykkjum. Mælt verður eisini til, at arbeiðið verður boðið út beinanvegin.

**Avgerð:**

Tilmæli frá teknisku nevndini varð samtykt. (8-1) Ímóti atkvøddi Tórfríður Abrahamsen.

## Mál nr. 50/2006.

**Mál viðvíkjandi egningarhølum.**

Til viðgerðar varð uppskot til leigusáttmála fyri egningarhølir á havnarøkinum. Hetta mál hevur verið til viðgerðar á fundi í havnanevndini tann 27. juni 2006, har nevndin mælti til, at leigugjaldið verður ásett soleiðis, at íløgan upp á kr. 3,4 mió., verður afturgoldin yvir 20 ár við 5% í rentu p.a.

Málið hevur verið til viðgerðar á býráðsfundi tann 14. september 2006, og varð beint aftur í havnanevndina, soleiðis at útrokningar skuldu verða gjørdar, um íløgan verður afturgoldin yvir 30 ár, og nakrar orðingar í sáttmálanum somuleiðis broyttar.

Sambært hjáløgdu útrokning frá teknisku deildini verða meirútreiðslurnar til rentur kr. 1.287.290,00, um fíggingin verður yvir 30 ár.

Hvananevndin hevur aftur havt málið til viðgerðar á fundi tann 21. september 2006, og mælir nevndin býráðnum til at góðtaka fyriliggjandi uppskot II til leigusáttmála.

Viðvíkjandi leigugjaldi fyriliggja tveir møguleikar:

A: Yvir 20 ár.
B: Yvir 30 ár.

Víst verður til hjáløgd skjøl:

**Avgerð:**

Tilmælið frá havnanevndini varð samtykt við tí broyting frá limunum á havnanevndini, at lánstíðin verður longd úr 20 árum upp í 30 ár, og at leigusáttmálin við útróðrarmenninar verður sama áramál. (9-0).

## Mál nr. 51/2006.

**Mál viðvíkjandi leigusáttmála til landingarmiðstøð.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Beinir Nolsøe Olsen, dagfest 10. juli 2006 um leingjan av leigusáttmálanum fyri bygning kommununar matr. nr. 239n á havnarøkinum.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í havnanevndini tann 21. september 2006, og mælir nevndin býráðnum til, at leigusáttmálin verður galdandi óbroyttur fram til 31. august 2009.

**Avgerð:**

Tilmæli frá havnanevndini varð samtykt. (8-0). Vísandi til § 6 í leigusáttmálanum um framleigu vm. varð samtykt, at leigusáttmálin ikki verður undirskrivaður, fyrr enn havnanevndin hevur havt fund við leigaran um hsi viðurskifti. Meðan málið varð viðgjørt varð Jón Nolsøe Olsen ikki á fundi vegna ógjegni.

## Mál nr. 52/2006.

**Skriv frá Signari á Brúnni um laðing á Oyrini.**

Fuglafjarðar býráð hevur móttikið skriv frá Signari á Brúnni, býráðslimi, dagfest 16. juli 2006, har heitt verður á borgarstjóran um at støðga tí ætlan, ið fremjast skal við áarmunnan við Gjógvará og lýsa til býráðsfund, so skjótt sum gjørligt, har allir býráðslimir fáa høvi at siga sína hugsan um hetta so stóra og týdningarmikla mál, fyri síðan at atkvøða um málið.

**Avgerð:**

Samtykt varð at útseta endaligu viðgerðina av málinum, til fundur hevur verið við Símun Arge frá Føroya fornminnissavni og neyðug uppskot gjørd. (8-0).

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 19.10.

Jann Toftegaard
Dánjal Vang
Signar á Brúnni
Jón Nolsøe Olsen
Torfríður Abrahamsen

Petur Abrahamsen
Elisabeth D. Eldevig
Eyðun á Lakjuni
Sigurð S. Simonsen